Opel Combi Tour

Á bilaframsýningini í Frankfurt var ein nýggjur Opel Combi Tour, sum verður ein beinleiðis kappingarneyti hjá Peugeot Partner, Citroën Berlingo og Renault Kangoo

Kelda: Motor Magasinet

Daewoo og GM

General Motors, Daewoo Motor Company og kredittorarnir hjá Daewoo, hava undirskriva eina avtalu um eitt nýtt felag, har GM, sum er størsti partaeigarin í Daewoo, kemur at eiga undir 50 prosent í nýggja felagnum.

Kelda: Motor Magasinet

Ford Fusion

Í Frankfurt stóð prototypan, Ford Fusion, sum tá ið hann kemur í framleiðslu, skal hava ein sera orkusparandi 1.1 litur bensin innsprænings motor við turboløðara.

Kelda: Motor Magasinet

ÚT AT KOYRA

Null-hugsjónin - ikki ómøgulig at fremja í verki

Dagin fyri at føroyska ferðalagið við fullsettum flogfari, tann 25. September, fór yvir til Trollhättan í Svøríki at hyggja nærri at svensku Null hugsjónini, helt Petur Jacob Sigvardsen, starvsnevndarformaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, ein sera áhugaverdan fyrilestur. Vit fara her, og í komandi vikum, at taka brot úr hesum fyrilestri saman við myndunum ið vórðu vístar

FERÐSLUTRYGD
Magnus Gunnarsson

Tað var sviin Claes Tingval, sum í 1995 kom fram við Null-hugsjónini. Nógv smíltust og hildu tá fyri, at hetta var ein føgur hugsjón, men at hon tíverri var ómøgulig at fremja í verki. Men í dag hevur hugsanin um Null-hugsjónina fest røtur hjá øllum teimum, sum starvast við ferðslutrygd. Henda hugsjón stendur nú meir og meir sum tað sjálvsagda stavnhaldið, miðað eigur at verða eftir, og kjakið nú á døgum snýr seg av álvara mest um, hvussu Null-hugsjónin skal verða handfarin og framd í verki.

Leggið til merkis, at Null-teknið er teknað sum eitt fostur, sum er væl vart í móðurlívi. Hetta er teknað soleiðis av ráddum huga fyri at sýna tann manngóða hugburðin, henda hugsjón hevur

Trupult at fyribyrgja

Tá um ferðsluskaðar er at røða, so er tað í roynd og veru ikki sjálv vanlukkan, sum er trupulleikin, men heldur tann skaði, ið stendst av henni. Tá ið vit fatað hetta til fulnar, læra vit eisini, at tað eru loysnir at finna á hesum trupulleika. Ein sera týdningarmikil loysn í so máta ar at avmarka styrkina á teirri megi, sum kann ráma tað einstaka menniskja á ferðsluni. Tað er ógvuliga torført at siga frammanundan, nær ella hvar ein vanlukka kann verða. Tí er tað eisini so sera trupult at byrgja fyri henni.

Óteljandi atvoldir

Harafturímót er rættiliga lætt at siga framanundan, hvussu stórur skaðin verður, um og tá ið ein vanlukka rámar. Atvoldirnar til vanlukkuna kunnuvera óteljandi. Men tað eru tveir faktorar, ið gera av, hvussu stórur skaðin verður, tá vanlukkan rámar:

Í fyrsta lagi: hvussu mikil tann megin er, ið rámar menniskja, og í øðrum lagi: hvussu stóra mótstøðumegi tað menniskja so hevur, ið verður rakt av hesi megi.

Tað verður eisini so nógv lættari at handfara ferðslutrygdarspurningin, um vit fáa innlit í hesar nevndu faktorar.

Brot úr fyrilestri hjá Petur J. Sigvardsen, starvsnevndarformanni í RFF

Yvir 40 Mazda E-2200 komnir til landið

Herfyri komu yvir 40 Mazda bilar av sama slag til landið. Talan er um Mazda E-2200 í ymiskum útgávum

BILAR
Magnus Gunnarsson

Felags fyri hesar bilarnar er, at teir eru allir av slagnum, Mazda E-2200, men teir fáast í ymiskum útgávum. Bilarnir eru komnir sum vørubilar við ella uttan síðurútar, og sum persónbilar til 6 ferðandi, ið kunnu gerast til ein 9 persónabil ella sum 10 persóna buss, og sum Pick-up við trælast. Frá Berg verður sagt at Mazda E-2200 er ein væl umtóktur, og nógv eftirspurdur arbeiðsbilur, ið er kappingarførur í prísi og dygd.

ítróttur

Nr. 191 • hósdagur • 4. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Eingin avgerð er tikin um venjaran

Tað verður ikki greitt fyrrenn síðst í mánaðinum, um tað verður Allan Simonsen ella onkur annar, sum verður landsliðsvenjari komandi ár

LANDSLIÐSVENJARIN
Jóannes Hansen

Í gjárkvøldið fór fótbóltslandsliðið á síðstu ferðina uttanlands í ár. Umvegis Danmark, har venjarin og útisetarnir skuldu koma umborð, lá leiðin niður til Slovenia. Síðsti landsdysturin í HM undankappingini verður spældur har suðuri seinnapartin leygardagin.

Landsliðsferðin er serlig á tann hátt, at talan kann vera um síðstu ferðina hjá Allani Simonsen saman við spælarunum, sum hann leygardagin skal hava ábyrgdina av fyri 52. ferð.

Fyrsta sáttmálaskeiðið hjá FSF og Allani Simonsen var í 1994 og í 1995. Síðani eru tríggjar nýggjar avtalur undirskrivaðar, og síðsta skeiðið verður liðugt, tá dysturin leygardagin er lokin.

Kanna og bíða

Longu eftir landsdystirnar í mars, sum vóru á útivølli í Luksemborg og Russlandi, segði Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF við Ítróttarsosialin, at tað vóru góðir møguleikar fyri, at ein nýggjur sáttmáli fór at verða undirskrivaður millum FSF og Allan Simonsen.

Tað er landsliðsnevndin hjá FSF, sum hevur arbeitt við venjaraspurninginum. Í fótbóltsprátinum hesa seinastu tíðina hevur verið frammi, at tað hevði verið upplagt, at ein nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður, meðan landsliðið er í Slovenia.

Formaðurin í landsliðsnevndini, Jens Erik Magnussen, er við í ferðalagnum í Slovenia. Hann sigur, at tað er ikki ætlanin at undirskriva ein nýggjan sáttmála við Allan Simonsen, meðan teir eru í Slovenia:

– Eg rokni ikki við, at venjaraspurningurin verður avgreiddur fyrrenn síðst í hesum mánaðinum.

Ætla tit at gera ein nýggjan sáttmála við Allan Simonsen?

– Tað er ein møguleiki fyri tí, men eg veit tað ikki. Møguleikin er treytaður av, at bæði vit og venjarin eru hugaðir at halda fram, og at vit semjast um treytirnar fyri framhaldandi samstarvi. Sjálvandi fara vit at tosa saman í Slovenia, men tað fer ikki at koma upp á tal, at vit fara at undirskriva sáttmála har niðri. So langt eru vit ikki komnir enn.

Hava tit aðrar møguligar loysnir?

– Vit hava kannað marknaðin, um tað ber til at siga tað soleiðis. Eg haldi, at eg fari ikki at siga meiri, enn at tað er rættuliga torført at fáa fatur á stórum kapasitetum, og at teir eru ógvuliga dýrir.

Tað vil siga, at tað kemur ikki upp á tal at fáa ein annan kendan útlending enn Allan Simonsen at taka sær av landsliðnum?

– Eg fái ikki svara hasum spurninginum fyrrenn seinni í mánaðinum, var svarið hjá Jens Erik Magnussen, formanni í landsliðsnevndini hjá FSF, áðrenn FSF ferðalagið lætti úr Vágum við kós ímóti Slovenia.

Hjálparvenjarin bíðar

Síðani 1996 hevur Jógvan Martin Olsen verið hjálparvenjari hjá Allani Simonsen. Jógvan Martin var í ferðalagnum úr Føroyum í gjár. Um hetta verður síðsta ferðin hjá honum sum hjálparvenjari hjá Allani Simonsen er ikki greitt. Men tað er greitt, at Jógvan Martin Olsen, sum hesi seinastu árini hevur verið í fulltíðarstarvi hjá Fótbóltssambandinum, komandi ár verður venjari hjá NSÍ.

– Í august boðaði eg FSF frá, at eg komandi ár fór at hava ábyrgdina av einum liði í 1. deild. Vit hava avtalað at tosa um møguligt samstarv í framtíðini, men eg havi ikki hoyrt frá teimum enn. Hvat viðvíkur a–landsliðnum skilji eg teir væl. Eg rokni við, at teir ætla at loysa venjaraspurningin, áðrenn teir fara í holt við spurningin um hjálparvenjaran, sigur Jógvan Martin Olsen, sum umframt at vera hjálparvenjari hjá Allani Simonsen eisini er venjari hjá U–19 landsliðnum og høvuðsábyrgdarmaður fyri øllum teimum yngru landsliðunum.

Tveir landsdystir í SvF

Leygardagin sendir føroyska sjónvarpið bæði frá dystinum hjá Føroyum og tí hjá Danmark og Íslandi

Leygardagurin verður næstan sjónvarpsdagur burturav á føroysku rásini. Sjónvarp Føroya hevur ikki fólk í Slovenia, men teir fara kortini at senda landsdystin millum Slovenia og Føroyar.

– Dysturin verður klokkan 15, og vit fara at hava viðmerkjarar í studinum her hjá okkum sjálvum, sigur Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í Sjónvarpi Føroya. Hetta er sami karmur, sum teir høvdu um frásøgnina, tá føroyingar 19. august spældu landsdyst í Jugoslavia.

Seinni sama dagin fer sjónvarpið at senda landsdystin millum Danmark og Ísland.

– Tað passar okkum fínt, at dysturin verður spældur klokkan 18. Tí ber tað til hjá okkum at senda báðar dystirnar beinleiðis. Vit vita, at nógvir føroyingar eru áhugaðir í bæði danska og íslendska landsliðnum. Talan er um avgerandi dyst, um tað skal eydnast Danmark at vinna bólkin og harvið kvalifiserað seg beinleiðis til HM endaspælið. Vit fara at samsenda við TV2 úr Parkini, upplýsir Øssur Winthereig.

jh

FCK fer undir tak

Og nú verður Heine Fernandez ikki við tær báðar komandi vikurnar

Tað vera tveir fótbóltsdystir í Parkini í Keypmannahavn í vikuskiftinum. Tann fyrri verður leygardagin, tá Danmark og Ísland fara at spæla í HM undankappingini. Hin seinni verður sunnudagin. Tá fara FCK og Silkeborg at spæla árliga dystin ímillum meistaraliðið og steypavinnararnar. Silkeborg vann steypafinaluna Kristi himmalferðardag, og FCK gjørdist fyrst í juni danskur meistari.

Tað er møguleiki at inniloka Parkina. Tá europeiska Grand Prix kappingin var í Parkini í vár, royndu teir dragitakið. Hetta hevði við sær, at DR kundi selja 38 túsund atgongumerki og harvið fíggja alt tiltakið, sum tað var.

Takið hevur ongantíð verið roynt í sambandi við fótbóltsdyst, men tað verður tað sunnudagin. FCK og Silkeborg fara at spæla undir taki. Dysturin verður sunnudagin klokkan 18 føroyska tíð, og hann verður at síggja á TV3+ rásini.

Fernandez úti

Fyrr í vikuni hoyrdist, at Heine Fernandez, sum skoraði øll fýra málini í Europa Cup dystunum ímóti Obilic, er so mikið skaddur, at hann ikki verður førur fyri at spæla næstu tvær vikurnar. Talan er um bruna í hælinum. Fernandez vónar at vera tøkur aftur, tá FCK í næsta UEFA Cup umfarinum fer at spæla ímóti Ajax Amsterdam. Fyrri dysturin verður 18. oktober.

Todi Jónsson er um at vera tøkur aftur. Tað er ikki greitt, um hann verður við sunnudagin. Nú Heine Fernandez er skaddur, hava teir í FCK uppaftur meiri brúk fyri, at Todi kemur fyri seg aftur.

jh